## DAGSINS MEINING

# Landsstýrið og fakfeløgini

Í summar hevur eitt ávíst orðaskifti verið um leiklutin hjá fakfelagsrørsluni í dagsins samfelag. Atfinningar hava verið at sæð í bløðum, og krøv hava verið sett fram um, at myndugleikarnir skulu avmarka virksemið hjá fakfelagsrørsluni. Tað er serstakliga verkfalsrætturin, ið er vorðin ein torn í eygunum á ávísum bløðum og flokkum. Atfinningarnar eru síðan fylgdar upp av einum lógaruppskoti frá Vinnumálaráðnum um fastan gerðarrætt. Tey, sum kenna uppskotið, halda tó, at talan meira er um veruligan arbeiðsrætt enn um ein gerðarrætt.

Fakfeløgini, serstakliga Starvsmannafelagið og Føroya Arbeiðarafelag, hava verið hart í móti uppskotinum hjá Vinnumálaráðnum um at fastan gerðarrætt. Henda støða er væl skiljandi, tí uppskotið hjá landsstýrinum fer alt annað líka at avmarka gomul hevdvunnin demokratisk rættindi hjá fakfelagsrørsluni. Uppskotið tykist í stóran mun at taka hædd fyri teimum atfinningum, sum hava verið frammi í ávísum fjølmiðlum. Atfinningarnar hava gingið uppá hetta, at verkføllini kosta samfelagum alt ov nógv í mun til tað, sum møguliga verður vunnið við hesum somu verkføllum. Hetta er ein pástandur, sum er líka so gamal sum fakfelagsrørslan. Hesin pástandur avdúkar bert, at teir, ið seta hann fram ikki hava skilt, hvat verkligt stríð veruliga snýr seg um. Tær broytingar, sum skulu gerast á arbeiðsmarknaðinum, skulu kunna góðtakast av øllum pørtum. Tí krevja tær ein dialog og skilagott hegni.

Í fyrstani ljóðaði, at samgongan var samd um útspælið frá Vinnumálaráðnum um gerðarrætt eins og hetta útspæl var heilt í tráð við atfinningar móti fakfelagsrørsluni, sum hava verið at sæð í blað, sum stendur einum av landsstýrisflokkunum nær. Men nú er vent í holuni! Ein og sama dag koma tveir av tingmonnum Tjóðveldisfloksins í fjølmiðlarnar og leggja sjógv millum flokkin og uppskotið hjá Vinnumálaráðnum um gerðaræltin. Hetta byrjar at líkjast einum føstum mynstri – samgonga og andstøða alt í einum ár út og ár inn. Enn einaferð er almenningurin vorðin vitni til eitt taktiskt spæl við einum sera álvarsomum máli. Hetta spælið er á mangan hátt margháttligt og vekir undran millum manna. Hetta er margháttligt, tí tað gevur almenninginum eina mynd av einum kaotiskum landsstýri, sum nýtir sína orku uppá taktikk og neisur. Hetta vekir undran, tí fólk halda, at landsins hægstu menn máttu havt annað og betri at nýtt sína orku til, nú tað er farið at sansa at og hann av álvara er farin búskaparliga at draga á luftina. Er als einki álvara í hesum monnum? spyrja mong í hesum døgum. Taka teir yvirhøvur støðuna í samfelagnum í álvara!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fastan gerðarrætt?

**Erhard Jacobsen**



Tað er áhugavert at fylgja við í kjakinum um ætlaðu broytingarnar í lóggávuni á arbeiðsmarknaðinum. Serliga tí at tú sjálvur einaferð hevur havt rættiliga nógv við slík mál at gera.

Tað minni áhugaverda er tó, at tað sær út til, at søgan endurtekur seg.

Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum tykist vera mest hugaður fyri, at avmarkingar skulu gerast í møguleikunum hjá arbeiðsfólki at skipa fyri tiltøkum. Gera arbeiðsfólk hetta ella hitt fyri at vinna sær rætt ella tryggja hendan rættin, so er eftir øllum at døma altíð okkurt galið (við arbeiðsfólkunum sjálvandi!), og ein Arbeiðsrættur má tí gera skjótt av og taka avgerð (døma tiltøkini ólóglig), so at arbeiðið og órætturin kann halda fram.

Veit landsstýrismaðurin ikki av, at soleiðis spæla vit ikki longur á arbeiðsmarknaðinum. Hvør tímir at finna seg í vánaligum arbeiðsumhvørvi, sjikanum, ongari ávirkan á egin arbeiðsviðurskifti o.s.fr.

Í dag tosa fólk saman, tey samráðast um tingini, vit hava álitisfólkaskipan, samstarvsnevndir, trygdarumboð, fakfeløg, arbeiðsgevarafeløg, sáttmálar, siðvenjur, ymsar avtalur, o.s.fr. umframt eitt lógarverk.

Trupulleikin er bara, at ávísir partar á arbeiðsmarknaðinum hava so óluksáliga ilt við at viðurkenna hesa omanfyri nevndu skipan. Her er tað eg sum ráði, og dermed basta! Men vald er ikki bara klandur og kúgan.

Eg haldi lítlan iva vera um, at vit hava brúk fyri gerðarrætti, antin valdum til høvið ella føstum, tað er líkamikið, til at loysa ósemjur í einum sáttmálaskeiði. Vit hava slíka skipan sum er, og hon kann møguliga víðkast, so hon virkar skjótari enn í dag. Men vit hava ikki brúk fyri einum Arbeiðsrætti, sum kann steðga og kriminalisera arbeiðssteðgi í sáttmálaskeiðnum. Er arbeiðssteðgur á einum arbeiðsplássi í sáttmálaskeiðnum, so er okkurt, sum ikki ruggar rætt, og tað eru hesi viðurskiftini, ein gerðarrættur eigur at taka støðu til.

Men harumframt vil eg siga, at vit hava eisini brúk fyri eini professionalisering av skipanunum á arbeiðsmarknaðinum, serliga av tí dagliga samskifti, sum feløgini á arbeiðsmarknaðinum hava sínámillum og mótvegis limum sínum. Spurningurin er bara, um tey, sum nú eru vald í leiðslurnar í hesum feløgum, eru búgvin ella hugað fyri at fáa til vega eitt annað arbeiðslag, sum m.a. kann minka um vandan fyri at verkfall ella verkbann er tað fyrsta vápnið, ein trívur eftir, tá ið sáttmálar eru farnir úr gildi.

**Tvey sløg av trætum**

Tá ið talan er um rættarviðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, er tað týdningarmikið at skilja ímillum tvær støður: 1) tá ið sáttmáli er galdandi og 2) tá ið sáttmáli er uppsagdur og farin úr gildi.

Í sáttmálaskeiðnum ræður friðarskyldan, tvs. vit arbeiða eftir galdandi reglum og gera eftir boðum (um boðini ikki eru fullkomiliga tápulig!) o.s.fr. Tað vil so vera, at tá ið tveir partar skulu samstarva (á ójøvnum føti, tí at arbeiðsgevarin hevur meginpartin av leiðslu- og tulkingarrættinum), so kunnu trupulleikar viðhvørt taka seg upp. Tað allarmesta av slíkum trupulleikum eigur at kunna loysast á staðnum, men onkuntíð stendur fast, og tá er gott at hava onkran at heita á, sum kann loysa fløkjuna.

Gerðarrætturin eigur at vera tað seinasta ein velur at senda boð eftir (um talan ikki er um prinsipiellar spurningar, sum báðir partar vilja hava viðgjørdar). Fyrst eiga tær vanligu kanalirnar at verða troyttar, t.d. samráðing og møguliga óformlig seming. Men verður brúk fyri gerðarrættinum. so má tað vera greitt, at hann bara undantaksvís sjálvkravdur kann grípa inn, at hann viðger sjálvt málið og ikki bara tiltøkini, og at hann, sum nevnt omanfyri, eisini viðger tulkingar av sáttmálanum.

Er tað so at arbeiðsgevarin, tá ið tað hóvar honum, kann leggja sínar trupulleikar fyri ein gerðarrætt (les: Arbeiðsrætt), so verður hesin rættur ein hóttan, eitt arbeiðsgevaravápn, sum onki gott ger.

Í sambandi við omanfyri nevndu professionalisering er ikki óhugsandi, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum sum frá líður ikki fara at ræðast gerðarrættin so illa, men fara at brúka hann skilagott.

So er spurningurin: hvat tá ið sáttmáli er farin úr gildið?

Har hava vit sum er frymilin: samráðing – seming – verkfall/verkbann. Hesin frymilin er galdandi í øllum framkomnum londum. Er tað so, at øll samráðingarumfør ár eftir ár enda í verkfalli ella verkbanni, so er okkurt galið í sjálvari skipanini.

Tað kunnu eisini vera samfelagslig ella politisk viðurskifti, sum føra til verkfall (t.d. at ávísir starvsbólkar fáa stóra lønarhækking, eitt nú tingmenn, at skattalætti verður veittur ávísum starvsbólkum o.s.fr. Tí so vilja hini sjálvandi hava tað sama).

Hetta vísir, at vit hava í hvussu er tríggjar partar í hesum spæli: politikarar (sum kunnu bera seg antin býttisliga ella skilagott at), arbeiðsgevarar og fakfeløg. Eg ivist onga løtu í, at tað ber til at loysa størri vandamál á arbeiðsmarknaðinum við trípartasamrøðum, og at hetta kann setast í verk saman við omanfyri nevndu professionalisering.

Men at taka heimildirnar frá nevndunum í verkafeløgunum at fara í verkfall og at leggja allan avgerðarrætt til semingsstovnin, tað er at háða arbeiðara- og verkafjøldina og fer bara at føra til, at talan sum oftast fer at vera um samráðingar upp á kvamsvís.

Jú, øll troyttast av longum verkføllum, men tað, sum fer at hjálpa uppá hesar trupulleikar á arbeiðsmarknaðinum, er fyrst og fremst eitt betri arbeiðslag, professionalisering, samstarv um ávís týðandi mál, álit og hegni.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Skála leggur 2 milj. krónur í fótbóltsvøllin



– Vit eru ógvuliga væl nøgd við arbeiði, ið gjørt er, sigur Kári Johannesen, bygdaráðsformaður
Mynd: Vilmund Jacobsen



Tað er Osvald Simonsen, ið umboðar Polythan, sum hevur selt Skála kommunu nýggja teppið til fótbóltsvøllin
Mynd: Vilmund Jacobsen

**– Sjálvur vøllurin, sum Polythan hevur leverað, kostar umleið hálva aðru miljón. Saman við umvælingararbeiðinum, flutningi, kosti og innivisti til útlendsku arbeiðsmenninar og litaða asfaltinum, sum nú skal leggjast rundan um vøllin, er hetta ein íløga uppá einar 2 milj. krónur, sigur Kári Johannesen, bygdaráðsformaður**

ÍLØGUR
*Vilmund Jacobsen*

Hóskvøldið fór formella handanin av nýggja teppinum, sum lagt er á fótbóltsvøllin á Skála, fram. Tað var Osvald Simonsen, ið umboðar donsku fyritøkuna, Polythan, sum handaði arbeiðið, ið nú er gjørt, til Skála kommunu.

Teir, ið umboðaðu kommununa við hetta høvi, vóru formaðurin, Kári Johannesen, Asbjørn Mikkelsen, formaður í mentanarnevndini og Tummas Michael Jacobsen, sum er bygdaráðslimur.

Eftir at hava verið úti á vøllinum og skoðað snotuliga verkið, fóru Osvald og bygdaráðslimirnir inn í ítróttarhøllina at tosa um, hvussu vøllurin skal viðlíkahaldast.

## Væl nøgdir

Kári Johannesen sigur, at gamla teppið á vøllinum, sum var 15 ára gamalt, var ógvuliga vánaligt.

– Vøllurin var nú vorðin so hálur í vátveðri, at spurningurin er, um vit høvdu fingið loyvi at brúka hann eitt ár aftrat.

Hann sigur, at skálafólk eru væl nøgd við arbeiðið, sum nú er gjørt. Umframt at nýtt og meira tíðarhóskandi teppi er lagt á, er ein partur av undirlagnum skift út.

– Undirlagið var farið nakað illa í støðum av gravmaskinum, sum hava grivið kava burtur. Tí hevur verið neyðugt at fremja hesar ábøtur fyri at fáa eitt so gott úrslit sum gjørligt.

Kári sigur, at tað er danska fyritøkan, Polythan, sum Osvald Simonsen umboðar, ið hevur gjørt umvælingararbeiði og hevur leverað og lagt nýggja teppið á fótbóltsvøllin.

– Tað eru 5-6 útlendsk fakfólk, sum hava gjørt alt hetta arbeiði, ið hevur tikið umleið hálvan annan mánaða.

Hann vísir á, at Polythan tey fyrstu árini, meðan garantiið stendur við, fer at eftirhyggja vøllin einaferð um árið og fer at busta hann á ein serligan hátt.

– Nú vøllurin verður nógv brúktur, skal hann eisini »bustast« við serligum bustum, ið verða drignar við bili, tvær ferðir um vikuna. Hetta er fyri, at svørtu gummikúlurnar, sum eru stroyddar um vøllin, skulu leggja seg uppá pláss – og fyri at halda »grasinum« uppi.

Kári sigur, at kunstgrasið er 35 mm. høgt, og sambært Osvaldi skal grasið frá gummikúlunum og uppá grasendan vera umleið 15 mm. høgt, soleiðis at grasið bert hevur hesar 15 mm. at ridla í, sum hann tekur til.

## Reytt asfalt

Nú nýtt teppi er lagt á fótbóltsvøllin, verður hond eisini tikin um økið rundan um vøllin.

– Vit fara at leggja litað, reytt ella grønt, asfalt rundan um allan vøllin. Asfaltið verður keypt frá Landsverkfrøðinginum, men arbeiðið verður gjørt sjálvboðið. Hetta er ikki ein stór íløga aftrat tí, sum gjørt er, sigur Kári.

Øll tey seks málini við fótbóltsvøllin eru eisini skift.

Spurdur, hvussu stór samlaða íløgan er, sigur bygdaráðsformaðurin:

– Sjálvur vøllurin, sum Polythan hevur leverað, kostar umleið hálva aðru miljón. Saman við umvælingararbeiðinum, flutningi, kosti og innivisti til útlendsku arbeiðsmenninar og litaða asfaltinum, sum skal leggjast rundan um vøllin, er hetta ein íløga uppá einar 2 milj. krónur, sigur Kári Johannesen.

Hann fegnast annars um, at júst hetta teppið, sum Osvald Simonsen umboðar, er lagt á vøllin, tí sambært eitt nú Dánjali Andreasen í Leirvík, er hetta tað nærmasta, tú kanst koma veruligum gasi.

– Dánjal væntar ikki, tað gongur long tíð, áðrenn altjóða fótbóltsheimurin fer at góðkenna hetta »grasið« til altjóða dystir, sigur Kári Johannesen, bygdarráðslimur á Skála at enda.



Kári Johannesen, bygdaráðsformaður, Tummas Michael Jacobsen, bygdaráðslimur og Asbjørn Mikkelsen, formaður í mentanarnevnd bygdaráðsins
Mynd: Vilmund Jacobsen



Her liggur hann. Kanska ikki so ógvuliga gamal, men nóg gamal til, at hann ongantíð aftur fer at sigla á havsins bylgjum
Mynd: Vilmund Jacobsen

# Hann hevur tænt fyri seg…

SØGA
*Vilmund Jacobsen*

**Skála:** Beint omanfyri bátahylin á Skála og í grasinum við síðuna av nýggju bátabrúgvunum, sum Skála kommuna nú fer at leggja út í bátahylin, sóu vit hetta rovið av einum báti, tá ið Sosialurin koyrdi fram við hóskvøldið.

Ein hugvekjandi sjón, og tankarnir fara at mala og snúgva seg um, hvør søgan um hendan bátin nú einaferð man vera.

Kanska drógu teir, ið áttu bátin, mangan góðan fongin um stokkin – ella kanska lá hann bara í bátahylinum og gnagaði gummi.

Tú hevur ongan spurt um søguna, og tí standa allir møguleikar opnir.

Er báturin brúktur til útróður, er eyðsæð, at onkur ruskutur túrur er gjørdur heim um Eystnes. Tað kemst ikki uttan um, tí hetta er eitt lítið far á havsins bylgjum. Bæði landnyrðingurin og útsynningurin eru ikki at spæla við á Nesinum, tá ið tað rekur upp í ættina.

Men báturin er so komin afturíaftur hvønn túrin; tí liggur hann her enn í dag.

Alt hevur sína søgu, og tað hevur hetta rovið, sum einaferð var ein nýsmíðaður bátur, eisini.

Hvør hevur bygd, og hvørjir eigararnir hava verið, vita vit ikki.

Hevur hetta rovið, sum einaferð var ein søggur, føroyskur bátur, sum sigldi út og inneftir Skálafjørðinum, eina søgu, eru fólk væl komin at siga okkum hana.